# Heilsurøktarar og heilsuhjálparar til Norðoya Røktarheim

Brennur tú fyri at skapa góð og virðilig kor saman við bú- og starvsfólkum á Norðoya Røktarheimi, so er tað kanska tær, vit sóknast eftir.

## Vit sóknast eftir

- Heilsurøktara í kvøldvakt á setanarbrøki 0,6 at byrja 1. des. 2017, ella eftir nærri avtalu
- Heilsurøktara í skiftandi vaktum á setanarbrøki 0,5 at avloysa frá 1. nov. 2017 – 31. aug. 2018, byrjast kann eftir nærri avtalu
- Heilsuhjálpara í náttarvakt á setanarbrøki 0,5 at byrja 1. des. 2017, ella eftir nærri avtalu
- Heilsuhjálpara í skiftandi vaktum á setanarbrøki 0,65 at avloysa frá 1. nov. 2017 – 31. aug. 2018, byrjast kann eftir nærri avtalu

Arbeitt verður annað hvørt vikuskifti.

Neyðugt er tó av og á at gera broytingar í arbeiðsætlanini, tí mást tú tola at broytingar møguliga verða gjørdar.

Á Norðoya Røktarheimi búgva 28 fólk á tveimum eindum, Uppistova og Niðristova.

Høvuðsuppgávan hjá starvsfólkunum á Norðoya Røktarheimi tekur støði í visjónini hjá Norðoya Bú- og Heimatænastu (NBH), sum er:

- NBH strembar eftir at skapa fjøltáttaðar møguleikar fyri nærveru, eldru borgarum, avvarðandi og starvsfólkum at gagni.
- NBH vil raðfesta fleksibilitet og samskapan í teimum loysnum, ið framyvir skulu finnast á eldraøkinum.
- Fyritreytin er eitt hugvekjandi øki, sum er grundað á álit, høgt fakligt støði og virðing.

## Førleikakrøv til heilsurøktarar og – hjálparar

- Útbúgving svarandi til størvini
- Áhuga í at arbeiða við eldri borgarum
- Áhugi og royndir innan demens er ein fyrimunur
- Góð samstarvsevni

## Vit kunnu bjóða

- Fakligar avbjóðingar
- Spennandi og sjálvstøðugt starv
- Gott samstarv við onnur fakfólk

## Lønar- og setanartreytir:

Lønar- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri kunning um størvini fæst við at venda sær til Monicu Ziska, deildarleiðara, á tlf. +298 793430.

Umsókn, við avritum av prógvum v.m., verður at senda til nbh@nbh.fo ella Norðoya Bú- og Heimatænastu, Nólsoyar Pálsgøta 32, Postsmoga 2, FO-710 Klaksvík.

Umsóknarfreistin til størvini er á middegi fríggjadagin 24. november 2017.